**EG MEINI TAÐ**

# Kollektivt skizofreni



*Elin Heinesen skrivar:*

Aftur herjar valstríðið, nú føroyingar skulu velja umboð inn á danating at tala Føroya søk. Spurningurin um loysing/samband - fullveldi ella ikki fullveldi - og okkara kollektiva skizofreni hesum viðvíkjandi vísir seg aftur í fullum blóma - sum ikki einaferð.

Í veruleikanum minnir kjakið fyri ella ímóti ríkisfelagskapinum ikki so lítið um kjakið fyri ella ímóti EU her niðri í Danmark, sum altíð tekur seg upp undan EU-valunum, uttan at eg vil samanlíkna hesi viðurskiftini annars, men argumentini eru ofta tey somu. Fullveldisfólkini vilja burtur úr ríkisfelagskapinum av kærleika til land og fólk, tí tey meina at stovnsetingin av einum føroyskum fullveldi er einasti mátin at varðveita og menna føroysku tjóðina. Sambandsfólkini vilja verða verandi í ríkisfelagsskapinum av kærleika til land og fólk, tí tey meina, at hetta er tryggasti mátin at varðveita góð lívskor á klettunum og menningarmøguleikar í Føroyum.

Soleiðis kunnu fólk halda so ymiskt um tað sama, meðan báðir partar í veruleikanum hava kærleikan til Føroyaland sum drívmegi aftanfyri - hóast partarnir helst vilja vera ósamdir við mær í hesum, tí tí trúgva tey jú ikki um hin partin. Og kortini. Henda sterka tjóðskaparkenslan knýtir jú føroyska fólkið saman - líkamikið hvussu ósamd vit eru innanhýsis - og ger okkum samstundis til eitt sameint fólk. Hóast vit kunnu vera nokkso ósamd, kunnu vit altíð savnast undir Merkinum og syngja okkara sorgblíðu sangir um elskaða móðurland okkara - øll við somu sannføring - í felagsskapi, við felags tjóðskaparkenslu, felags rót, felags søgu.

Tað er eisini hetta, sum ger okkum til eitt annað fólk enn danir. »Syddanskere«, plaga danir at taka til um seg sjálvar, tá teir royna at vísa okkum, at teir síggja Føroyar sum ein líkaverdugan part av danska ríkinum, men sjálvir kundu føroyingar aldrin droymt um at brúkt eitt sovorðið heiti. Skuldu vit so kallað okkum »centrum-danskere« ella »midt-danskere«? Einki kundi ligið okkum meira fjart. Og tað er hetta, sum nógvir danir tykjast at hava so ilt við at skilja. Í øllum førum teir, sum ongantíð hava stigið sín fót á klettarnar - og tað eru jú teir flestu.

Tað er, sum um danir nærmast blíva smáfirtnir um, at (summir) føroyingar ikki síggja Føroyar sum ein part av danska ríkinum - hesum vælsignaða flata landi, sum danir jú elska eins høgt, sum vit elska Føroyaland. Danir fata tað, sum um vit ikki halda teir vera nóg góðar til okkum. Meðan føroyingarnir á sínari síðu eru smáfirtnir inn á danir, tí hví skulu teir forða fyri at føroyska tjóðin blívur altjóða viðurkend sum tjóð? Eru vit ikki nóg góð til at vera ein tjóð? Soleiðis hugsar hvør út frá sínum egna nalva.

Báðir partar kenna seg misskildar og traðkaðan á tærnar av hinum. Úrslitið er, at vit grava eina størri grøv millum okkara, enn neyðugt er. Og tað, sum alt veruliga snýr seg um, verður burturgloymt. Tað snýr seg slettis ikki um okkara viðurskifti við danir - um okkara ótakksemi og mótvilja mótvegis dønum, sum nógvir danir uppfata tað. Nei, eingin føroyingur ynskir at kvetta øll bond av millum føroyingar og danir, sum vit hava havt so nógv samskifti við tey 600 árini, ríkisfelagskapurin hevur verið til. Allarflestu føroyingar hava eitt tætt og gott samband við Danmark - fullveldisfólk og sambandsfólk hvørt um annað - tí vit hava næstan øll familju og/ella vinir í Danmark.

Men hetta sambandið ger okkum ikki til minni føroyingar - ella meir ein part av Danmark. Vit eru føroyingar, serstøk tjóð undir øllum umstøðum - og júst tí er ikki rættiligt pláss fyri í núverandi ríkisfelagskapsskipan, tí hon loyvir ikki viðurkenning av okkum sum tann tjóðin, vit jú eru langt inn í fólkasálina. Tað er hesum plássi, sum føroysku fólkatingslimirnir eiga at fara niður at berjast fyri. Tí so leingi sum føroyingar ikki verða viðurkendir av øðrum sum tann tjóðin, vit sjálvi kenna okkum sum, fer kollektiva skizofreniin at trívast í Føroyum og eljustríðið millum okkara innanhýsis at halda á.

Vikuskifti
Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

# Ein Volvo 144 fylti 30 í gjár

**Hann var fyrstur við Rituni í 1971. Og fyrstur við Teistanum í 2001. Og hann verður kanska eisini fyrstur gjøgnum undirsjóvartunnilin undir Skopunarfirði**



*Brynjolvur Jensen og Volvo-bilurin framman fyri Rituna á Bursatanga í Havn. Fyri 30 árum síðan varð bilurin, sum tann fyrsti heysaður, umborð á Rituna og fluttur til Skopunar. Í gjár vóru 30 ár síðani, at bilurin varð skrásettur, og er hann sum nýggjur á at líta*

**FYRI 30 ÁRUM SÍÐANI**

*Eirikur Lindenskov*

Í gjár skrivaðu vit 16. november 2001. Fyri Brynjolv Jensen, tryggingarmann í Hoyvík, var hetta ein serligur dagur, tí tá vórðu liðin 30 ár síðani bilur hansara fyrstu ferð varð skrásettur – í Føroyum.

Tað var Petur Poulsen í Skopun, sum keypti bilin í 1971. Júst tá var nýggja strandfaraskipið, Ritan, farið í sigling, og var Volvo-bilurin tann fyrsti bilurin, sum varð fluttur við Rituni um Skopunarfjørð.

Brynjolvur Jensen keypti bilin fyri 10 árum síðani. Hann kendi væl bilin, sum ofta vitjaði í heimbygd Brynjolvs, Sumba. Eisini hevði Brynjolvur í síni tíð sum sýnsmaður á Bileftirlitinum ofta sýnað bilin.

Brynjolvur hevur lagt stórt arbeiði í at seta bilin í uppruna stand aftur, og er hann á at líta sum tá hann var nýggjur. Uttan sum innan er bilurin grønur og hevur uppruna intrekk og teppi. Bilurin hevur bert koyrt 85.000 km øll hesi 30 árini – í miðal undir 3.000 um árið. Hóast merktur av aldri, so var bilurin ikki slitin.

Í Føroyum var einki felag fyri fólk, sum hava áhuga fyri at røkja og varðveita gamlar bilar, tá Brynjolvur keypti hendan bilin. Men bilurin hevur so verið við til at kveikt áhugan fyri felagnum Føroya Elliskafør, sum Brynjolvur, saman við øðrum, stovnaði í 1992. Hann var tá, og er enn, formaður í felagnum.

– Tað er nakað heilt serligt at hava eitt ellisakfar, sum hevur sín uppruna í Føroyum, sigur Brynjolvur Jensen við blaðið hjá Føroya Ellisakførum. Hann sigur, at hann ofta hevur hugsað sum so, at bilurin hjá sær ikki var eitt ellisakfar. Men nú bilurin er farin um tey tríati, kann Brynjolvur stíga fram og vísa eitt upprunaligt føroyskt ellisakfar. Svørtu Fø 51.548 nummarpláturnar skriva søgu saman við bilinum.

Tá nýggja strandfaraskipið, Teistin, varð sett í sigling millum Gomlu Rætt og Skopun, beyð Strandferðslan Brynjolvi og Volvo-bilinum við. Aftur hesa ferð skrivaði hann søgu, tí hann var fyrsti bilur, Teistin flutti um Skopunarfjørð.

Tað eru valla fleiri bilar í Føroyum, sum kunnu bjóða ferjunum av í livitíð. Brynjolvur heldur tó ikki, at bilurin um 30 ár aftur verður fyrstur við eini nýggjar Sandoyarferju:

– Tá verður hann fyrstur gjøgnum undirsjóvartunnilin undir Skopunarfirði – á veg til Sumbiar, sigur Brynjolvur smílandi.

Livst so spyrst…

# Miljø í Skansastovu

**Fotodeildin skipar fyri almennari fotoframsýing í desember. – Stórur áhugi er fyri fotoítrivinum, sigur formaðurin í Fotodeild Skansastovu, Sveinur Thomassen**

**FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI**

*Eirikur Lindenskov*

Ungmannafelagið Skansastova í Havn var eitt sera virkið felag í sjeytiárunum. Í oktober 1976 hevði Sosialurin hesi tíðindini frá Skansastovu:

»Í døgunum 4. og 5. desember skipar fotodeildin hjá ungmannafelagnum Skansastovu í Havn fyri almennari fotoframsýning í hølunum hjá Skansastovu á Kirkjuveg.

Framsýnararnir koma samstundis at luttaka í einari fotokapping undir heitinum Kringumstøður (miljø).

Hetta merkir, at teir luttakandi framsýnararnir skulu senda inni miljøkendar myndir, sigur formaðurin í nevndini fyri fotodeild Skansastovu, Sveinur Thomassen.



*Stórur áhugi er fyri fotoarbeiði í Skansastovu, segði Sveinur Thomassen við Sosialin í oktober 1976*

## Dómaranevnd

Fotodeildin hevur sett eina dómaranevnd til at velja út tær bestu myndirnar.

Í nevndini sita Kalmar Lindenskov, Kári Petersen, Eyðun Joensen, Gunvør Hoydal og Ingálvur av Reyni.

– Myndirnar skulu vera svart/hvítar, minsta stødd 18X24. Tær skulu sendast til fotodeild Skansastovu í seinasta lagi 20. november. Men hesum verður nærri greitt frá í lýsing í bløðunum, sigur Sveinur Thomassen.

## 20 fólk til fotoítriv

Sveinur Thomassen sigur, at tað hevur verið stórur áhugi fyri fotoarbeiði millum tey ungu, síðani Skansastova skipaði eina fotodeild.

– Vit hava myrkakamar og aðra útgerð til at framkalla í og gera myndir í Skansastovu. Byrjað varð í vár, og royndin hevur eydnast so væl, at nú er rættilig gongd komin á hetta ítrivið, sum savnar eini 15-20 fólk í Skansastovu, sigur Sveinur Thomassen.

Hinir nevndarlimirnir í fotodeild Skansastovu eru Axel Haraldsen, Lis Hansen, Nella Festirstein og Jórun Mortensen.«



# Á leitan eftir herberginum

**Mentunargrunnur Studentafelagsins hevur nú um dagarnar givið út stuttsøgusavnið Pílagrímar eftir Hanus Kamban. Hetta er fjórða stuttsøgusavn høvundsins. Undir sínum gamla navni Hanus Andreassen gav hann á sama forlagi út Dóttir av Proteus (1980), Við tendraðum lyktum (1982) og Hotel Heyst (1986).**






Hanus Kamban: »Pílagrímar«, - Mentunargrunnur Studentafelagsins, - 131 bls. - Kostn.: 220,- kr.

Níggju stuttsøgur eru í hesum savninum. Einasta søgan, eg við nøkulunda vissu kann tíðarfesta, er Angels Place, ið er stendur fremst í savninum. Hon vann stuttsøgukappingina, ið Listasamband Føroya skipaði fyri í vár.

## Summi lúgvast tíðliga

Pílagrímar hevur ikki heitið eftir nakrari av søgunum í bókini, so hesin tittulin er heldur at lesa sum onkur sambinding av temunum í teimum ymsu søgunum. Í vanligari merking er ein pílagrímur ein persónur, ið er á ferð móti onkrum heilagum staði, eitt nú Róm ella Mekka. Orðið er tó kanska eins vanligt í fluttum týdningi, har mannalívið verður fatað sum ein pílagrímsferð. Tey flestu munnu komast við mætu allegoriina Pilgrim´s Progress (1678) eftir John Bunyan.

Ein av pílagrímunum er Lott, høvuðspersónurin í Angels Place. Hon er endað í stórbýnum, har hon vinnur til føðina við at arbeiða sum skøkja. Sum stór smágenta varð hon neyðtikin av beiggja sínum, og hon gongur dagliga til sálarlækna. Vit hitta hana á eini café, har hon, millum møguligar kundar, situr og droymir um at fáa sína egnu klinikk einaferð – sítt Angels Place, ið annars er hølið hjá rokkaraharkaliðnum í býnum. »Veruleikin, visti hon, var altíð gráur og óromantiskur. Men hon elskaði ynskidreymar, og onkuntíð hugsaði hon sær, at dreingirnir í húsinum við veingjamerkinum vóru pílagrímar, einsligar sálir sum hon sjálv, villar, vilstar, leitandi eftir onkrum fjarum herbergi, sum ikki var av hesum heimi«. (s. 15)

Hennara Angels Place verður heldur ikki av hesum heimi, tí tilhúsafturkomin stoytir hon eitt glas av doyvandi tablettum í seg og leggur seg bara at bíða til tann endaligi svøvnurin tekur hana. Hetta var ein heldur óvæntaður endi – sum tó ikki er so sjáldsamt í stuttsøgum – men søgan er í fleiri fláum, og tann retrospektivi frásøguhátturin við lopum aftur í barndómin setur upp mótsetningar, sum í síðstu atløgu júst mugu føra til ein slíkan enda.

»Summi lúgvast tíðliga og leggjast fyri..« stendur í eini kendari føroyskari yrking. Soleiðis er tað eisini við fleiri av pílagrímunum í hesi bókini. Á ymsan hátt eru teir endaðir uttanfyri tilhaldið, kanska á lívsins botni, sum eitt nú tann mentaði Fritz Friedrich í søguni Rovfuglurin. Teir fara »út um ringvegin« sum Stefan í søguni av sama navni, og leita inn í tann psykedeliska rúsin. Ella teir fáa allan býin ímóti sær, sum Julian Ziska í søguni Dintilsdagar, og enda í einsemi. Og summi gerast sinnisjúk.

Kærleikin, ella kynslívið, kemur ofta til sjóndar í avskeplaðum líki, so sum blóðskemd, pedofili ella neyðtøku. Ella í sviki og sjalusi. Har eitt sindur av lukku sær út til at vera, sum í Gestir hjá feigum ella Tann hvíti maðurin, lúrir altíð eitthvørt meinhugað, ið vil forkoma hesi somu lukku.

## Mentaði heimsborgarin

Eg nevndi tann retrospektiva frásøguháttin. Hanus brúkar hann meira og minni konsekvent í hesum søgunum. Byrjan og endi standa sum karmur um søguna, og onkur kann minna um eina kinesiska eskju, har eitt afturlítandi brot verður lagt inn í eitt annað. Hendinga ferð kann hetta vera ørkymlandi, so lesarin kennir seg eitt sindur vilstan í frásøgnini.

Hesar søgurnar eru ikki júst ætlaðar til dagdvølju. Stílurin hjá Hanusi setir rættiliga stór krøv til lesaran. Her hugsi eg ikki bara um tær drúgvu inntonktu høvundsviðmerkingarnar við setningum, ið ofta strekkja seg yvir fleiri reglur. Helst skalt tú eisini kenna klassikararnar og nakað væl afturat. Í heilum verður sipað til høvundar, bókmentaverk ella fyribrigdi úr fornari mentan og søgu, og við tað, at høvundurin stundum ger ov mikið av at nýta samanburðir, kunnu hesar tilsipingar kennast heldur privatar. Um Fritz í søguni Rovfuglurin verður t.d. sagt, at hann var »ikki ólíkur myndum, eg havi sæð av Walther Benjamin«. Og um Margareth í Út um ringvegin fáa vit at vita, at hon líktist Nefertite. Kanska hetta gevur eina aha-uppliving hjá onkrum, men eg hugsi, tey allarfægstu munnu vita, at Nefertite var ein egyptadrotning, ið doyði 1354 f.Kr., og hvørs andlitsmynd verður framsýnd á tí egyptiska fornminnasavninum í Vestur-Berlin.

Hesin »hámentaði« stílurin skorðar tó onkursvegna upp undir høvuðstematikkin í tí nógva av ritverkinum hjá Hanusi: mótsetningin millum tað mentaða/intellektuella menniskjað og »harðræði teirra óupplýstu«, sum hann hevur tikið til í onkrari grein. Høvuðspersónarnir í søgunum hava aloftast eina mentanarliga kjølfestu, ið veitir teimum tign, hóast teir ikki njóta virðing frá samfelagnum. Tignin gevur seg til kennar m.a. í ansi fyri náttúru, bókmentum og list, hollari vitan og innliti, sum í einum heimi av kúgan, líðing og deyða hevjar hesar persónar hátt yvir trongskygni, heimføðiskap og kraddaralyndi.

## Janus gongur aftur

Eg fái ikki, á einari blaðsíðu, farið djúpari inn í lagnurnar hjá hesum lívsins pílagrímum. Hóast søgurnar tematiskt eru nær skildar, so eru tær rættiliga ymiskar í evnavali, t.v.s tann ytri leikpallurin skiftir frá eini søgu til aðra. Í stórskornum sundurbýti kann hann vera sálarfrøðiligur sum í Angels Place, søguligur sum í Tann hvíti maðurin, heimssøguligur sum í Gestir hjá feigum, dramakendur sum í Fortuna. Og hann kann eisini vera biografiskur sum í seinastu søguni Ein ónyttug stjørna. Her er tað Janus Djurhuus, skald, ið bókstaviliga gongur aftur. Sum kunnugt skrivaði Hanus ævigsøgu í trimum bindum um skaldið, og hendan søgan er ein skaldslig umskriving og tulking av einum intermezzo, har Anna Djurhuus, seinni kona skaldsins var miðdepil. Hon er høvuðpersónurin í søguni.

Nú er Hanus so farin undir ævisøguna um hitt Áarstovu-skaldið, Hans Andrias; so tað verður spennandi at vita, um vit aftur skulu bíða í 15 ár eftir skaldsligari prosu frá hansara hond. Hetta var ið hvussu er eitt kærkomið stuttsøgusavn, um tað ikki beinleiðis førir við sær eitt nýbrot í føroyskum bókmentum. Vit mugu staðfesta, at høvundurin eftirhondini hevur prógvað, at hann dugir at skriva stuttsøgur og kanska hevur funnið sítt herbergi. Skulu vit nú ikki seta okkum at bíða eftir skaldsøguni..?